# ÁRSINS VITANARFRÓÐU



## HVÍ ER REYÐMAÐKUR GÓÐUR FYRI MOLDINA OG ER NAKAR REYÐMAÐKUR Í MOLDINI UTTANFYRI SKÚLAN? HVAT KUNNU VIT GERA FYRI AT FÁA MEIRA REYÐMAÐK Í MOLDINA?



Granskarar: Boas Wenningstedt Vang, Silas Leifsson Ørvarodd, Elisia Isaksen,

Silja J. Bárðardóttir & Lilja Thomasen

# INNGANGUR

Vit í skúlanum í Kvívík hava arbeitt við, at okkara skúli skal gerast grønari. Í tí  sambandi, settu vit í fjør eplir og rabarbur niður, eins og at vit plantaðu ymiskt grønt. Tá fingu vit at vita, at reyðmaðkur skuldi verða góður fyri moldina, men vit sóu ongan reyðmaðk. Hetta hevur undrað okkum síðani. Tí hava vit kannað, um tað verulig ikki er nakar reyðmaðkur uttan fyri skúlan hjá okkum.

Lærarar:

Turið á Tórgarði turi.a.torgardi@skulin.fo  & Malan Petersen malan.petersen@skulin.fo

Luttakarar:

Náttúra og tøkni, 4. – 6. flokkur. Í hesum bólkinum eru:

Boas Wenningstedt Vang, Silas Leifsson Ørvarodd, Elisia Michaelsdatter Isaksen, Silja J. Bárðardóttir & Lilja Thomasen

Vit loyva, at frágreiðingin verður løgd á gransking.fo, og at tilfar úr henni kann verða nýtt til marknaðarføring.

# INNIHALD

1. Hetta undrast vit á

2. Hví er tað so?

3. Leggið eina ætlan

4. Savnið upplýsingar

5. Hetta eru vit komin fram til

6. Sigið øðrum frá

7. Fylgiskjøl

# 1. HETTA UNDRAST VIT Á

Spurdómur:

1. Hví er reyðmaðkur góður fyri moldina?

2. Er nakar reyðmaðkur í moldini uttanfyri skúlan?

3. Hvat kunnu vit gera fyri at fáa reyðmaðk í moldina?

# 2. HVÍ ER TAÐ SO?

Fyri at finna út av hví reyðmaðkur er góður fyri moldina, hava vit gjørt nakrar hypotesur, sum vit fara at kanna nærri, og vita um tær passa ella ikki.

1. Vit halda at reyðmaðkur hevur eina sterka sýru at bróta niður við.

2. Vit halda at tað eru eingir reyðmaðkar í moldini uttan fyri skúlan.

3. Vit halda at vit kunnu keypa nakrar kompostmaðkar, og koyra teir út í moldina.

# 3. LEGGIÐ EINA ÆTLAN

Hetta fara vit at gera saman, síðani fara vit at leggja eina ætlan um, hvat hvør skal gera.

- Vit fara at gera eitt hugarok um, hvat vit skulu finna út av.

- Vit fara at lesa um reyðmaðk og evnir, ið hava við mold og reyðmaðk at gera.
- Vit fara at leita á netinum eftir vitan.
- Vit fara at hyggja eftir videobrotum um maðkar.
- Vit fara at leita eftir maðkum.
- Um vit ongar maðkar finna, fara vit at keypa maðkar frá einari konu, sum alir maðkar.

# 4. SAVNIÐ UPPLÝSINGAR

Tá ið ætlanin var gjørd, fóru vit at savna upplýsingar til hvørja hypotesu, og hava vit fingið nógva vitan av netinum úr bókum, við at tosa við ein serfrøðing, umframt, at vit hava roynt at leita/granska í bønum uttan fyri skúlan.

Vit hava m.a. vitan frá:

Surrandi og krúpandi smákykt[1]

file:///C:/Users/tt/Desktop/Vitanarfr%C3%B3%C3%B0u/Dyr_og_plantur_handbok1.pdf síða 85-86

https://denstoredanske.lex.dk/regnorme?gclid=CjwKCAjwxr2iBhBJEiwAdXECwzuovcGruw5jzWVfgtDMjiDmbRlaGsz40maf_cE6Uq3WZpy2irBwIBoCr-IQAvD_BwE

https://nordlysid.fo/tidindi/65026/ein-reydmadkur

https://kvf.fo/gmf?sid=139283&page=1

[1] Beinta Johannessen 2020

# 5. HETTA ERU VIT KOMIN FRAM TIL

Vit hava valt at svara hvørjari hypotesu við at nevna tær hypotesa 1, 2 og 3.

**1.** Tað er ikki sýran hjá reyðmaðkinum, sum ger, at hann er góður fyri moldina, men: Reyðmaðkurin etur smáar algur, soppar, dýr og bakteriur, sum liva av plantum á/í jørðini. Hann blandar deyðar plantur uppí moldina. Reyðmaðkurin ger gongdir í moldini soleiðis at moldin gert meiri luftig, og harvið sleppur vatnið betri til planturøturnar. Soleiðis fær moldin betri góðsku. Maðkurin er tískil av alstórum týdningi fyri moldina.

**2.** Vit hava – í tímar – grópað og grivið í einum stórum øki runt um skúlan, við vón um at finna reyðmaðk, men tað er ikki eydnast okkum. Tískil kann staðfestast, at vit hava ongan reyðmaðk **funnið**. Tað er tó ikki nøkur staðfesting uppá, at ongin reyðmaðkur er í økinum runt um skúlan, tá vit av góðum grundum ikki kunnu grava alt upp.

**3.** Vit eru komin fram til, at tað ikki er so einfalt við maðkum. Tað eru nevniliga nógv sløg. Vit fóru at keypa maðkar frá einari konu, ið alir maðk, og ætlaðu at koyra teir í moldina, men hon átti bara kompostmaðk og tað er ikki heilt tað sama sum reyðmaðkur. Kompostmaðkur livir nærri yvirflatuni, dámar betur vátari umhvørvi, etur ikki heilt tað sama sum reyðmaðkur og so yvirlivir hann bara í komposti og ikki í moldini.

Um vit skulu hava reyðmaðk í moldina, mugu vit finna nakrar og ala teir, fyri síðani at seta teir út. Tað nyttar onki at koyra ein og tveir maðkar út, men helst eini 20-30 saman. So nú er at bróta upp ermar, finna reyðmaðk onkrastaðni og byrja at ala.

# 6. SIGIÐ ØÐRUM FRÁ

Vit hava valt at geva okkara vitan víðari á skúlanum og nú eisini hjá tykkum.

# FYLGISKJØL

Mynd av reyðmaðkaalikari

Reyðmaðka alikar

